# Serstøk byggisamtykt

fyri útstykking á Grótbrúgv

# 1 Ásetingar fyri Øki B1

## Innhaldsyvirlit


1 Ásetingar fyri Øki B1 1
1.1 Nýggja útstykkingin við Grótbrúgv í Vestmanna. 1
1.1.1 Ábyggingarstig: 1
1.1.2 Nettonýtingarstig: 1
1.1.3 Byggilinjur: 2
1.1.3.1 Stykki í B1-1: 2
1.1.3.2 Stykki í B1-2: 2
1.1.3.3 Stykki í B1-3: 2
1.1.4 Hæddar viðurskiftir: 3
1.1.4.1 Stykki í B1-1: 3
1.1.4.1.1 Við mønu: 3
1.1.4.1.2 Við einsíðuhalli: 3
1.1.4.1.3 Bilskúrar o.l.: 3
1.1.4.1.4 Skráar móti granna: 3
1.1.4.2 Stykki í B1-2: 3
1.1.4.2.1 Við mønu: 3
1.1.4.2.2 Við einsíðuhalli: 3
1.1.4.2.3 Bilskúrar o.l.: 4
1.1.4.2.4 Skráar móti granna: 4
1.1.4.3 Stykki í B1-3: 4
1.1.4.3.1 Við mønu: 4
1.1.4.3.2 Við einsíðuhalli: 4
1.1.4.3.3 Bilskúrar o.l.: 4
1.1.4.3.4 Skráar móti granna


## 1.1 Nýggja útstykkingin við Grótbrúgv í Vestmanna.

Partur av B-øki í Vestmanna, (sí tekningar B.001-01H-01 og B.002-01HL-01), verður broyttur til serstaka byggisamtykt fyri sethús.
Økið verður býtt upp í hesar partar við hvør sínum ásetingum:

I. B1-1: Vestasta rað av grundøkjum. Øll grundøkir hava atkomu vestureftir upp frá vegi.
II. B1-2: Mittastu røð av grundøkjum (norðan- og sunnanfyri rundkoyring). Øll grundøkir hava atkomu oman av vegi eystureftir.
III. B1-3: Eystasta rað av grundøkjum. Øll grundøkir hava atkomu eystureftir oman av vegi.

### 1.1.1 Ábyggingarstig:

I. hægst loyvda ábyggingarstig er 0,40.

### 1.1.2 Nettonýtingarstig:

I. hægst loyvda nettonýtingarstig er ikki ásett, men er nýtingarstigið avmarkað við ásetingum um byggilinju og hæddarviðurskiftir.

## 1.1.3 Byggilinjur:

### *1.1.3.1 Stykki í B1-1:*

I. frástøða frá vegi skal minst vera sum víst á tekning B.002-01HL-01.
II. frástøða frá grannamarki skal í minsta lagi vera 2,5m.
III. byggifeltið er avmarkað til at byggjast kann í mesta lagi 10,0m uppat byggjilinju móti síðugranna, og er byggifeltið haðani avmarkað við 45° avsneiðing móti byggilinjuni longst frá atkomuvegi.
IV. úthang (takskegg) kann í mesta lagi stinga 0,5m út um ásettu byggilinju.
V. Bilskúrar, hjallar og úthús kunnu verða bygd nærri grannamarki eftir nærri reglum, sum byggivaldið ásetir, og um hetta er samsvarandi kapittul 5 í bygningskunngerðini 2017. Eisini kann byggjast til í minsta lagi 2,0 m frá øksl á gongubreyt/parkeringsøki. Verður bygt nærri mørkum enn ásett er fyri sethús er hetta við serligum hæddarásetingum, sum eru lýstar niðanfyri.

### *1.1.3.2 Stykki í B1-2:*

I. frástøða frá vegi skal minst vera, sum víst á tekning B.002-01HL-01.
II. frástøða frá grannamarki skal í minsta lagi vera 2,5m.
III. byggifeltið er avmarkað til at byggjast kann í mesta lagi 10,0m uppat byggjilinju móti síðugranna, og er byggifeltið haðani avmarkað við 45° avsneiðing móti byggilinjuni longst frá atkomuvegi.
IV. Byggifeltið á stykki nr. 8 verður avmarkað til, at byggjast kann í mesta lagi 13 m uppat byggilinju norðureftir, og byggifeltið haðani avmarkað við $45^0$ avsneiðing móti byggilinjuni longst frá atkomuvegi.
Byggifeltið á stykki nr. 13 verður avmarkað til at byggjast kann í mesta lagi 13 m uppat byggilinju suðureftir, og byggifeltið haðani avmarkað við $45^0$ avsneiðing móti byggilinjuni longst frá atkomuvegi.
V. úthang (takskegg) kann í mesta lagi stinga 0,5m út um ásettu byggilinju.
VI. Bilskúrar, hjallar og úthús kunnu verða bygd nærri grannamarki eftir nærri reglum, sum byggivaldið ásetir, og um hetta er samsvarandi kapittul 5 í bygningskunngerðini 2017. Eisini kann byggjast til í minsta lagi 2,0 m frá øksl á gongubreyt/parkeringsøki. Verður bygt nærri mørkum enn ásett er fyri sethús er hetta við serligum hæddarásetingum, sum eru lýstar niðanfyri.

### *1.1.3.3 Stykki í B1-3:*

I. frástøða frá vegi skal minst vera, sum víst á tekning B.002-01HL-01.
II. frástøða frá grannamarki skal í minsta lagi vera 2,5m.
III. byggifeltið er avmarkað til at byggjast kann í mesta lagi 10,0m uppat byggjilinju móti síðugranna, og er byggifeltið haðani avmarkað við 45° avsneiðing móti byggilinjuni longst frá atkomuvegi, tó undantikið fyri byggilinjurnar millum stykkini 3 og 4, har loyvt er at byggja 15m fram við grannamarki.
IV. Byggifeltið á stykki nr. 1 verður avmarkað til, at byggjast kann í mesta lagi 13 m uppat byggilinju norðureftir, og byggifeltið haðani avmarkað við $45^0$ avsneiðing móti byggilinjuni longst frá atkomuvegi.

Byggifeltið á stykki nr. 7 verður avmarkað til, at byggjast kann í mesta lagi 13 m uppat byggilinju suðureftir, og byggifeltið haðani avmarkað við $45^0$ avsneiðing móti byggilinjuni longst frá atkomuvegi.
V. úthang (takskegg) kann í mesta lagi stinga 0,5m út um ásettu byggilinju.
VI. Bilskúrar, hjallar og úthús kunnu verða bygd nærri grannamarki eftir nærri reglum, sum byggivaldið ásetir, og um hetta er samsvarandi kapittul 5 í bygningskunngerðini 2017. Eisini kann byggjast til í minsta lagi 2,0 m frá øksl á gongubreyt/parkeringsøki. Verður bygt nærri mørkum enn ásett er fyri sethús er hetta við serligum hæddarásetingum, sum eru lýstar niðanfyri.

## 1.1.4 Hæddar viðurskiftir:

### *1.1.4.1 Stykki í B1-1:*

Í hesum øki kunnu hús byggjast í tveimum hæddum, íroknað kjallara. Byggjast kann tak við mønu ella einsíðuhalli.
Hægst loyvdu hæddir viðv. stykkjum í øki B1-1 eru, sum fylgjandi nevnt:

#### 1.1.4.1.1 Við mønu:

I. hædd frá ásettari planeringshædd í tekning B.002-01HL-01 og upp til yvirgrind (yvirsíða á yvirsyll) má í mesta lagi vera 6,0m.
II. sternhæddin á úthangi (takskeggi), sum stingur út um ásettu byggilinju, má ikki stinga hægri enn 0,2m uppum ásettu hædd til yvirgrind.
III. hædd frá planeringshædd upp til mønu, má í mesta lagi vera 9,0m, tó má tekja við møn halda seg undir eini hallinju á 30° inn frá stern – skjøldur móti síðugranna undantikin.

#### 1.1.4.1.2 Við einsíðuhalli:

I. hædd frá ásettari planeringshædd í tekning og upp til yvirgrind (yvirsíða á yvirsyll) má í mesta lagi vera 6,0m.
II. sternhæddin á úthangi (takskeggi), sum stingur út um ásettu byggilinju, má ikki stinga hægri enn 0,2m uppum ásettu hædd til yvirgrind.
III. hædd frá planeringshædd upp til hægru síðu av takinum, má í mesta lagi vera 7,5m, og til lægru síðu av takinum í mesta lagið 6,0 m – skjøldur móti síðugranna undantikin.

#### 1.1.4.1.3 Bilskúrar o.l.:

I. Bilskúrar, hjallar og úthús, sum verða bygd nærri grannamarki enn 2,5 m skulu ikki vera hægri enn 2,5 m yvir ásettu planeringshædd.
II. Fyri bilskúrar, hjallar og úthús, sum verða bygd nærri øksl á gongubreyt/parkeringsøkjum enn byggilinjan fyri sethús ásetur, er mest loyvda hædd 2,5 m yvir hædd á jaðara av gongubreyt mitt útfyri miðás av hesum bygningi.

#### 1.1.4.1.4 Skráar móti granna:

I. Verður uppfylt/planerað hægri enn ásettu planeringshædd fyri grundøkið (t.d fyri terrassu, palli ella øðrum uppihaldsøki), skal skráin móti grannamarki frá hesum ikki hava hall, sum er reystari enn 1:1,5 .

### *1.1.4.2 Stykki í B1-2:*

Í hesum øki kunnu hús byggjast í einari hædd uttan kjallara. Byggjast kann tak við mønu ella einsíðuhalli.
Hægst loyvdu hæddir viðv. stykkjum í øki B1-2 eru, sum fylgjandi nevnt:

#### 1.1.4.2.1 Við mønu:

I. hædd frá ásettari planeringshædd í tekning B.002-01HL-01 og upp til yvirgrind (yvirsíða á yvirsyll) má í mesta lagi vera 3,5m.
II. sternhæddin á úthangi (takskeggi), sum stingur út um ásettu byggilinju, má ikki stinga hægri enn 0,2m uppum ásettu hædd til yvirgrind.
III. hædd frá planeringshædd upp til mønu, má í mesta lagi vera 7,0m, tó má tekja við møn halda seg undir eini hallinju á 30° inn frá stern – skjøldur móti síðugranna undantikin.

#### 1.1.4.2.2 Við einsíðuhalli:

I. hædd frá ásettari planeringshædd í tekning og upp til yvirgrind (yvirsíða á yvirsyll) má í mesta lagi vera 3,5m.
II. sternhæddin á úthangi (takskeggi), sum stingur út um ásettu byggilinju, má ikki stinga hægri enn 0,2m uppum ásettu hædd til yvirgrind.

III. hædd frá planeringshædd upp til hægru síðu av takinum, má í mesta lagi vera 6,0m, og til lægru síðu av takinum í mesta lagið 3,5 m – skjøldur móti síðugranna undantikin.

#### 1.1.4.2.3 Bilskúrar o.l.:

I. Bilskúrar, hjallar og úthús, sum verða bygd nærri grannamarki enn 2,5 m skulu ikki vera hægri enn 2,5 m yvir ásettu planeringshædd.
II. Fyri bilskúrar, hjallar og úthús, sum verða bygd nærri øksl á gongubreyt/parkeringsøkjum enn byggilinjan fyri sethús ásetur, er mest loyvda hædd 2,5 m yvir hædd á jaðara av gongubreyt mitt útfyri miðás av hesum bygningi.

#### 1.1.4.2.4 Skráar móti granna:

I. Verður uppfylt/planerað hægri enn ásettu planeringshædd fyri grundøkið (t.d fyri terrassu, palli ella øðrum uppihaldsøki), skal skráin móti grannamarki frá hesum ikki hava hall, sum er reystari enn 1:1,5 .

### *1.1.4.3 Stykki í B1-3:*

Í hesum øki kunnu hús byggjast í tveimum hæddum, íroknað kjallara. Byggjast kann tak við mønu ella einsíðuhalli.
Hægst loyvdu hæddir viðv. stykkjum í øki B1-3 eru, sum fylgjandi nevnt:

#### 1.1.4.3.1 Við mønu:

I. hædd frá ásettari planeringshædd í tekning B.002-01HL-01 og upp til yvirgrind (yvirsíða á yvirsyll) má í mesta lagi vera 6,0m.
II. sternhæddin á úthangi (takskeggi), sum stingur út um ásettu byggilinju, má ikki stinga hægri enn 0,2m uppum ásettu hædd til yvirgrind.
III. hædd frá planeringshædd upp til mønu, má í mesta lagi vera 9,0m, tó má tekja við møn halda seg undir eini hallinju á 30° inn frá stern – skjøldur móti síðugranna undantikin.

#### 1.1.4.3.2 Við einsíðuhalli:

I. hædd frá ásettari planeringshædd í tekning og upp til yvirgrind (yvirsíða á yvirsyll) má í mesta lagi vera 6,0m.
II. sternhæddin á úthangi (takskeggi), sum stingur út um ásettu byggilinju, má ikki stinga hægri enn 0,2m uppum ásettu hædd til yvirgrind.
III. hædd frá planeringshædd upp til hægru síðu av takinum, má í mesta lagi vera 7,5m, og til lægru síðu av takinum í mesta lagið 6,0 m – skjøldur móti síðugranna undantikin.

#### 1.1.4.3.3 Bilskúrar o.l.:

I. Bilskúrar, hjallar og úthús, sum verða bygd nærri grannamarki enn 2,5 m skulu ikki vera hægri enn 2,5 m yvir ásettu planeringshædd.
II. Fyri bilskúrar, hjallar og úthús, sum verða bygd nærri øksl á gongubreyt/parkeringsøkjum enn byggilinjan fyri sethús ásetur, er mest loyvda hædd 2,5 m yvir hædd á jaðara av gongubreyt mitt útfyri miðás av hesum bygningi.

#### 1.1.4.3.4 Skráar móti granna

I. Verður uppfylt/planerað hægri enn ásettu planeringshædd fyri grundøkið (t.d fyri terrassu, palli ella øðrum uppihaldsøki), skal skráin móti grannamarki frá hesum ikki hava hall, sum er reystari enn 1:1,5.

Vestmanna Bygdarráð 31. mai og 13. juni 2017

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 17/00715 |
| Ætlanarskriv: | 2/10-2017 |
| Góðkent: | 13/10-2017 |
| Váttað: | [signature] |